ítróttur

Nr. 159 • mikudagur • 24. august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Kvinnureningin verður endurtikin

Fyrireikararnir vóru ovfarnir, tá tað var greitt, hvussu stór undirtøkan til kvinnurenningina í Havn var leygardagin.

Ikki færri enn 214 kvinnur vóru møttar upp, tá farið varð ígongd, og hetta sýnir helst týðiliga, hvussu stórur tørvurin á slíkum tiltøkum er.

Ein hóskandi samanbering kundi í hesum sambandi verið drigin til heilsurenningina, har ein rúgva av fólki eisini tók undir við tiltakinum.

Hóast talan ikki er um beinleiðis kapping, so er tað kanska júst hetta sama, sum ger, at undirtøkan er somikið góð. Her er endamálið einans at fáa gongd í vøddarnar, og tí koma eisini nógv, sum mest sum ikki kundi funnið upp á at tikið lut í vanligari rennikapping.

Og orðini frá luttakarunum eftir kappingina staðfestu eisini, hvør tørvurin á hesi er. Flestar vóru kvinnurnar á einum máli um, at ein slík renning sjálvsagt skal verða afturvendandi táttur, og sum tað framgongur á lýsing aðra staðni á síðuni, so eru fyrireikararnir úr Bragdinum eisini framúr væl nøgd um undirtøkuna.

Sum partur av renningini hava luttakararnir sjálvandi eisini møguleika at kanna eftir, hvussu skjótt tær løgdu teir 4,2 kilometrarnar aftur um bak. Tey úrslitini kunnu finnast á heimasíðuna, www.athletics.fo.

**-jm**



*Fyrireikararnir vórðu púrasta tiknir av bóli, tá tað stóð greitt, hvussu stórur áhugin fyri kvinnurenningini leygardagin var*

# Besti kappsiglarin

**Thyra av Strondum var aftur hesa ferð fremsti báturin, og nú eigur Svend Berg ferðasteypið frá Lions Club Eysturoy til ognar**

KAPPSIGLING
*tíðindaskriv*

Eins og gjørt hevur verið nú í 36 ár, skipaði Lions Club Eysturoy fyri árligu kappsiglingini á Skálafjørðinum sunnudagin 21. august. 30 bátar høvdu meldað seg til siglingina, men ein meldaði tó avboð.

Av 4/5-mannaførunum byrjaðu 25 bátar vestanfyri Flesjarnar at sigla inn móti Høgabóli, har málið var.

Byrurin var ikki góður, eitt lot av útsynningi suðri, men knappar tveir tímar seinni kom tann seinasti báturin um málið.

Eitt ferðasteyp hevur ferðast millum fremstu bátarnar síðani 1989, uttan at nakar hevur vunnið tað til ognar. Treytin er, at tann báturin, sum er fyrstur á mál í trý ár, fær steypið til ognar.

Tríggir bátar høvdu í ár møguleikan at vinna steypið, við tað at teir høvdu vunnið tað tvær reisur fyrr. Hesir vóru Hoyvíksbáturin, Miðgerð og Thyra. Fyrstur á mál var Thyra, sum sostatt vann ferðasteypið til ognar.

Nummar 2 varð Malli og nummar 3 Hoyvíkingur. Hesir fingu allir steyp til ognar.

Í matarhølinum hjá Fiskavirking í Runavík komu manningarnar saman til hugnaligt prát afturvið kaffi og pannikøkum. Men fyrst mintust siglararnir og lionslimir Símun Rasmussen av Strondum, sum doyði herfyri.

Hann var øll árini við til at skipa fyri siglingini og við til at mynda tær siglingarreglur, ið enn verða nýttar.

Umframt 4/5-mannaførini sigldu nakrir størri bátar, og komu teir á mál í hesi røð:

Nummar 1 Dvørgamoy, nummar 2 Greipur, nummar 3 Reysti umframt bátur mannaður við kvinnum.

Lions Club Eysturoy takkar siglarunum fyri luttøkuna.

Seldu lutaseðlarnir verða drignir 5. september.

**Endaliga úrslitið varð hetta**

| Nr | Bátur | Eigari/Siglari | Staður |
|---|---|---|---|
| 1 | Thyra | Svend Berg | Strendur |
| 2 | Malli | Oddmar Joensen | Kollafjørður |
| 3 | Hoyvíkingur | Egil & Johan Simonsen | Hoyvík |
| 4 | Jona | Per Mikkelsen | Strendur |
| 5 | Svanur | John Mikkelsen | Skála |
| 6 | Helga | Kaj Johannesen | Kaldbak |
| 7 | Kollsteinur | Mikkjal Hansen | Hósvík |
| 8 | Miðgerð | Arngrím Petersen | Kollafjørður |
| 9 | Niels í Nesinum | Alfred Gullbein | Tórshavn |
| 10 | Eyðbjørg | Pól Arni Poulsen | Strendur |
| 11 | Búgvin | Osvald Hansen | Tórshavn |
| 12 | Johanna | Jógvan Páll Hammer | Argir |
| 13 | Eið | Atli Leitistein | Runavík |
| 14 | Pluto | Meinhardt Christiansen | Skála |
| 15 | Nósi | Eli Joensen | Leirvík |
| 16 | Vinur | Óli Mikkelsen | Tórshavn |
| 17 | Bispurin | Martin Dam | Kaldbak |
| 18 | Ternan | Kári Borgarklett | Hósvík |
| 19 | Leivur | Jón Nolsøe | Kollafjørður |
| 20 | Sildin | Jónsvein Mikkelsen | Toftir |
| 21 | Elisabeth | Símun Olsen | Vestmanna |
| 22 | Nón | Agnar Olsen | Hósvík |
| 23 | Luddi | Dávur Thomassen | Kollafjørður |
| 24 | Gjáarbáturin | Janus Petersen | Kollafjørður |
| 25 | Jóan Pauli | Jóhannus Johannesen | Kollafjørður |

**KVINNURENNINGIN 2005**
**takkar luttakarum, hjálparfólki og stuðlum fyri eitt sera væleydnað tiltak**



**Stuðlað tiltakinum hava:**
**Atlantic Airways • MBM • Føroya Bjór • Poul Hansen**
**Føroya Studentaskúli • Drós • Kvinna • Árstíðirnar**
**Skálabúðin • Yndi Fitness • Sportmaster**
**Thomas Dam Ítróttur • Salongin við Landavegin**
**Cosmeto v/Mariu Vilhelmsen**
**Mensendieck v/Maluni Thomsen**
**Beauty Care v/Susan Benjaminsen**

**Úrslitini frá renningini eru at finna á: www.athletics.fo**

**Við rennikvøðu**
**BRAGDIÐ**